

*Gullfossur, størsti fossur í Evropa, er ein heilt serlig uppliving.*




*Gongugøtan í Reykjavík er sera hugnalig við nógvum forvitnisligum handlum og góðum matstovum*

savninum og greiðir frá øllum tí, vit síggja. Savnið er rættiliga stórt og opið. Vit ganga eftir eini gøtu inni í savninum, sum líkist eini bátabrúgv. Ymsastaðni eru plátur við teksti, sum greiðir frá ymiskum tíðarskeiðum, og fuglaljóð og aldututl hoyrast, so tað kennist, sum eru vit á eini rættari ferð aftur í tíðina. Vit síggja stórar myndir, ymiskar lutir, stórar dukkur í gomlum klæðum, bátar, ymisk amboð og ikki minst: saltfisk. Leiðarin greiðir fá, at tey hava tætt samstarv við skúlarnar har á leiðini, sum ofta koma á vitjan. Tá skipa tey fyri ymiskum kappingum og vísa filmar um saltfiskasøguna. Okkara ferð gjøgnum savnið endar í Portugal, har Rosita hevur fingið saltfisk, Baccalao, úr Íslandi. Eg takki fyri blíðskapin, og eri eitt sindur hørm um, at eg ikki havi ráð til at keypa eina vakra íslendska troyggju, sum hongur í handlinum.

Komin aftur til Reykjavíkar, fara vit trý út at eta á eini fínari matstovu, sum liggur mitt í býnum. Eg angri, at eg át so nógv við Bláa Lónið, tí nú fáa vit eini fýra-fimm lekrar rættir, sum hvør smakkar betur enn annar. Eg fái hummarasúpan, lunda, villgás, reinsdjór og alt møguligt annað gott; komi næstan í neyð av øllum matinum. Tað einasta, sum mær ikki dámar serliga væl, er hálvstokti lundin, sum bløðir eitt sindur; Davíð og Sigurdur eru glaðir við, tí hálvstoktur (eg vildi næstan kallað tað ráður) lundi er eitt tað besta, teir fáa.

Mett og væl sett fara vit ein túr í býin. Leygarkvøld í Reykjavík er altíð spennandi, sigur Davíð, tí at tá eru altíð so nógv ferðafólk í býnum, og øll eru í góðum lag. –Jú, rætt hevur hann. Vit fara inn á eina matstovu, sum um kvøldið verður til café og um vikuskiftini til diskotek; eitt áhugavert stað, sum óivað hevði riggað væl í miðbýnum í Havn, hugsi eg. Vit keypa okkum ein drykk og sita so og práta og hugna okkum eina løtu, áðrenn vit venda nøsini heimeftir; vit hava ein langan dag fyri okkum í morgin.

**Sunnudagur, 7. mai 2006:**
Vaknaði ikki so tíðliga, sum eg ætlaði mær. Leypi undir brúsuna, áðrenn Davíð og Sigurdur koma eftir mær á Ørkini. Í dag skal eg sleppa at síggja Geysir og Gullfoss. Geysir! Eg minnist, tá ið eg sum smágenta fyrstu ferð sá myndir hagani; fantastiskt! Tað tekur eina løtu at koyra til Geysir, og á vegnum fara vit til Hveragerði, sum er vinarbýur hjá Nes Kommunu, og heimstaðurin hjá Davíði. Vit koyra ein túr runt í býnum og fara inn í Edens Hava, sum er eitt vakstrarhús við ymiskum plantum, djórum, matstovum og øðrum. Rættiliga forvitnisligt, men vit gera skjótt av, og halda síðani leiðina fram til Geysir.

Íslendska náttúran er stórsligin; á veg til Geysir steðga vit við eitt krater, og so eru vit endiliga har. Geysir. Eg síggi, hvussu vatnið sprýkir upp úr jørðini; má líka koyra hondina niður í; eg hevði ikki væntað, at vatnið var so heitt, sum tað er. Sigurdur greiðir frá, at í dag er tað bert Strokkur, sum goysir. Síðan ein jarðskjálvta í 2000 goysir Geysir sera sjáldan. –Má grína, tá ið eg royni at benda at goysa… tað er ikki altíð so líka til. Davíð sigur, at tey kunnu fáa Geysir at goysa við at lata sápu ella okkurt líknandi niðurí, men tað sæst á økinum, at tað er ikki eitt serliga gott hugskot. Strokkur goysir ikki líka høgt sum Geysir, men tað er ein uppliving at síggja allíkavæl.

Síðani gongur leiðin til Gullfoss. Tað, sum er serligt við Gullfossi, er, at hann er størsti fossurin í Evropa, tá ið hugsað verður um, hvussu nógv vatn ferðast gjøgnum hann. Við Gullfoss steðga vit eina løtu og fáa okkum ein kaffimunn á matstovuni, sum er beint við. Deiligt at fáa okkurt heitt niður um; veðrið er ikki líka gott í dag, sum tað var í gjár. Niðri við Gullfoss eru – eins og við Geysir – nógv ferðafólk. Vit steðga eina løtu við fossin at taka myndir. – Eg haldi, at Sigurdur kanska er í so djarvur, tá ið hann stendur so ygst og tekur myndir. Dettur tú í henda fossin, sleppur tú neyvan upp aftur. Tá ið Sigurdur hevur fingið sínar myndir í kassan, fara vit aftur í bilin. Nú gongur leiðin til Eyrabakka, har Fríðrikkur býr.

Davíð og Sigurdur tvætla býtt í bilinum. Tað er nokk so serligt; Davíð og eg tosa føroyskt, Davíð og Sigurdur tosa íslendskt sínamillum, og Sigurdur og eg tosa danskt okkara millum… eitt sindur ørkymlandi fyri ovastu hædd viðhvørt, men tað er stuttligt; vit hugna okkum saman.

Eyrabakki minnir rættiliga nógv um eina føroyska bygd. Húsini hava nærum sama snið og eru eins litføgur og húsini har heima. Fríðrikkur sigur, at Eyrabakki er rættiliga serlig, tí at íslendarar eru ikki vanir við at síggja slíkar bygdamyndir longur. – Teir ríva niður so hvørt, sum teir byggja nýtt, sigur hann. Vit fara inn í eini hugnalig, hvít hús, við reyðari grund. Húsini eru ein matstova, sum eitur Rauða Húsið. Her fáa vit enn einaferð nógvan og góðan mat at eta; ein fiskarætt, sum eg ikki havi royndt fyrr, og góða súpan til forrætt.

Tætt við Rauða Húsið eru eini onnur hús, kallað Gamlað Húsið. Gamlað Húsið er partur av tjóðarsavni Íslands og virkar sum eitt fornminnissavn. Vit ganga runt hvør í sínum lagi og lesa tey ymisku skeltini, sum eru við teir ymisku lutirnar. Eg gangi næstan í eini aðrari verð, tá ið Fríðrikkur rópar á meg; hann skal vísa mær okkurt. Eg gangi eftir ljóðinum inn í eitt rúm, har eitt sjál og okkurt annað plagg hanga aftan fyri ein glas rút. Eg undrist á, hvat man vera so serligt við júst hasum klæðunum, til eg síggi, hvat stendur á skeltinum: made from human hair… Eg snerki við, og haldi tað vera sera ólekkurt, at ein kona hevur gjørt ymisk klæði burtur úr sínum egna hári og hárinum hjá dóttrini. Fríðrikkur flennir og sigur, at soleiðis sá andlitsbráið hjá drottningini eisini út, tá ið hon var har fyri nøkrum árum síðani. Er tað løgið?

Vit ganga ein lítlan túr á Eyrabakka og práta um leyst og fast, áðrenn vit aftur seta okkum í bilin og koyra aftur til Reykjavíkar. Eri rættiliga troytt nú; gleði meg til at síggja songina á Ørkini.

Á sjómansheiminum siga vit hvørjum øðrum farvæl. Davíð og Sigurdur skulu báðir til arbeiðis í morgin, og eg havi gjørt eina avtalu við Mallu, áðrenn eg skal á flog á middegi.

**Mánadagur, 8. mai 2006:**
Vaknaði við, at sólin skein beint í andlitið á mær. Hugsi, at eg havi verið ótrúliga heppin í veðrinum hetta vikuskiftið. Eg pakki kuffertið, og fitta gentan í móttøkuni á Ørkini ringir eftir einum bili til mín.

Í hurðini stendur Malla við systurommusoninum Benadikt og veittrar til mín. Hon er so hugnalig. Vit práta um leyst og fast, meðan hon ger okkum morgunmat: ristað breyð við ymiskum viðskera og te afturvið. Hetta er ein deiligur endi á einum góðum vikuskifti. Tá ið eg skal fara at ringja eftir einum bili at koyra meg út á flogvøllin, kemur Bibi, systir Mallu, eftir mær. Onki roks, hon skal koyra meg. – Íslendingar eru eitt fitt fólkaslag; eg gleði meg, til eg sleppi at vitja landið aftur!